SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Iran minnir um Irak. Vit skuldu fáa prógv, men tey komu ongantíð, tí alt vísti seg at vera ósatt*

*(Ron Paul)*

# Rice í andglettinum



*Condoleezza Rice var í andgletti í Kongressini í gjár*

**Amerikanska Kongressin ivast í øllum skuldsetingunum hjá stjórnini ímóti Iran, og tað fekk uttanríkisráðharrin at kenna í gjár**

– Tað er týðiligt, at stjórnin hevur eingi prógv fyri sínum tosi um, at Iran er í ferð við at fáa sær kjarnorkuvápn, og hetta tosið minnir óhugnaliga nógv um tær følsku ákærurnar ímóti Irak, áðrenn vit gjørdu innrás í landið, segði republikanarin Ron Mark, sum var formaður í kongressnevndini, sum hevði sent boð eftir Condoleezza Rice, uttanríkisráðharra í gjár.

Ron Paul segði seg eisini ivast í, at Bush-umsitingin hevur rætt, tá hon leggur Iran undir at hjálpa uppreistrarmonnunum í Irak.

– Tá vit biðja umsitingina um prógv fyri teimum álvarssomu skuldsetingunum, fáa vit bara at vita, at tey eru í ferð við at savna prógvtilfar. Hetta minnir um Irak. Tá komu skuldsetingarnar fyrst, og vit skuldu fáa prógvini seinni. Men tey komu ongantíð, tí tað vísti seg, at einki hald var í skuldsetingunum, segði Ron Paul.

Embætismenn hjá stjórnini hava í fleiri vikur lovað at leggja fram prógv fyri, at Iran hjálpir uppreistrarmonnunum í Irak í bardaganum við teir amerikonsku hermenninar.

### Vardi stjórnina

Condoleezza Rice royndi sum frægast at verja stjórnina. Hon helt ikki, at stjórnin ger ov nógv burturúr fyri at rudda slóð fyri einum álopi á Iran.

– Tað hava vit ongar ætlanir um, segði hon.

Hon helt uppá, at Iran styðjar yvirgangsmenninar í Irak, og hon vildi vera við, at iranska stýrið letur Hizbollah í Libanon vápn og aðra útgerð, og at shiamuslimskir uppreistrarmenn fáa venjing har.

Condoleezza Rice segði, at tað er ikki bara amerikanska stjórnin, sum sigur, at iranat hjálpa uppreistrarmonnunum í Irak. Hon vísti á, at bretar siga tað sama, og at í seinastuni eru uppreistrarmenninir farnir at brúka nútímans vápn, sum teir uttan iva hava fingið um markið úr Iran.

Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Washington, Sean McCormack, segði í gjárkvøldið, at stjórnin fer at útvega prógv fyri, at Iran hjálpir uppreistrarmonnunum í Irak.

– Men tað tekur tíð, tí vit ætla at tryggja okkum, at upplýsingarnar eru rættar, tá tær koma, segði hann.

# Keða seg og drekka seg í hel við heimabryggi

Tey sosialu viðurskiftini í Letlandi eru so vánalig, at nógv fólk drekka seg í hel.

Gerandisdagurin hjá nógvum letlendingum er strævin og lítið hugaligur, og tað hevur við sær, at nógvir letlendingar stytta sær dagin við at drekka meiri, enn gott er. Í nógvum førum er tað heimabryggj, sum verður drukkið, sjálvt um tað er bæði ólógligt og ofta eisini eitrandi.

Blaðið Baltic Times veit at siga, at í fjør doyðu meiri enn 70 letlendingar eftir at hava drukkið ólógligt heimabryggj. Umleið 3.300 fólk máttu viðgerast fyri alkoholeitran, men læknarnir siga fyri blaðnum, at nógv fleiri enn so vórðu eitrað av ólógligum heimabryggi. Í landspartinum Preili har eysturi í landinum var støðan so álvarssom, at myndugleikarnir noyddust at lýsa landspartin í undantaksstøðu.

Letlendska løgmálaráðið hevur nú boðað frá, at tað ætlar sær í hernað ímóti tí ólógliga og eitrandi heimabrygginum.

## STUTT SAGT

### Putin táttar takið

Russisku myndugleikarnir hava gjørt av at avmarka møguleikarnarhjáútlendskum íleggjarum at gera íløgur í Russlandi. Tingið hevur eftir uppskoti frá stjórnini og Vladimir Putin, forseta samtykt eina lóg, sum ger tað truplari hjá útlendingum at gera íløgur í 40 ymsar vinnugreinar. Millum vinnugreinarnar eru olja og orka, og tað fer at fáa avleiðingar fyri norsku oljufeløgini Statoil og Hydro, sum høvdu ætlað sær at gera íløgur í russiska partinum av Barentshavinum, skrivar Netavisen. Í summum vinnugreinum merkir tann nýggja lógin, at útlendingar kunnu ikki eiga meiri enn 50 prosent av einari einstakari vinnufyritøku. Vladimir Putin, forseti, hevur fyrr sagt, at Russland eigur at brúka sítt ómetaliga stóra náttúrurikidømi sum eitt uttanríkispolitiskt amboð, og eygleiðarar siga, at tann nýggja lógin er eitt lið í teirri ætlanini.

### Fangar flýddir

Fleiri fjølmiðlar í Suðurkorea skriva í dag, at tað eydnaðist 120 fangum at flýggja úr einari fangalegu í Norðurkorea fyri einum góðum mánað síðani. Sambært fjølmiðlunum flýddu fangarnir úr fangaleguni Hwasong, sum er stutt frá markinum til Kina og Russland, og nakrir av fangunum eru seinnir tiknir í Kina og sendir aftur til Norðurkorea. AP skrivar, at millum 150.000 og 200.000 politiskir andstøðingar eru í fangalegum í Norðurkorea.

### Lítið avlop

Roknað varð við, at skandinaviska flogfelagið SAS hevði einar 690 mió. svenskar krónur í avlopi í fjør, men nú roknskapurin er almannakunngjørdur, er talið bara 292 mió. svenskar krónur. Hóast tað er beri enn í fjør, eru eygleiðararnir vónsviknir, skrivar Ritzau. Roknskapurin vísir, at SAS hevði 60,8 mia. svenskar krónur í umsetningi í 2006. Tað var góðar fimm mia. meiri enn árið fyri, men útreiðslurnar til brennievni vuksu heili 15 prosent í fjør.